# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



Í fjør varð eisini skipað fyri fótbóltskvøldið í Miðlahúsinum, tá virðislønir vórðu lætnar teimum bestu. Fríggjakvøldið verða avloysararnir hjá hesum funnin

# Rimmar fótbóltskvøld

**Fótbóltsfólk úr øllum landinum koma í Miðlahúsið, tá bestu fótbóltsfólkini á árinum skulu kjósast**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað kann væl vera, at veðrið var heldur keðiligt, tá seinasta floytið var í Formuladeildini seinasta leygardag.

Men fyri tað ber væl at halda eina rimmar fótbóltsveitslu, og tað er hetta, sum Miðlahúsið hevur sett sær fyri at gera í kvøld. Fótbóltsfólk og -spælarar úr øllum landinum hava boðað frá luttøku, og rokna verður við fullsettum hølum, har fótbóltsreyp og –prát verður á skránni í tríggjar tímar.

Hæddarpunktið á kvøldinum verður sjálvandi, tá ymsu handanirnar fara fram, og verða tær fyrstu av hesum á skránni klokkan 22. Rás2 sendir eisini beinleiðis frá tiltakinum, og umframt ymsu handirnar verður sjálvandi eisini prátað við fleiri av veitslugestunum, eins og tónleikur og bara hugni verður á skránni.

## 10. ferðin

Hetta er tíggjunda ferðin, at Sosialurin skipar fyri kjósanini av bestu fótbóltsfólkunum í landinum. Og runda talið er eisini ein av orsøkunum til, at serliga nógv verður gjørt burtur úr kvøldinum hesaferð.

Atkvøðugreiðslan er skipað soleiðis, at venjarar og liðskiparar hjá liðunum í Formula-deildini og 1. deild kvinnum hava greitt atkvøðu, og hartil eru umboð fyri fjølmiðlarnar eisini sloppin framat at siga sína hugsan. Hvør atkvøða telur eitt stig, og er ikki loyvt hjá venjarum ella spælarum at atkvøða fyri persónunum úr sínum egnu feløgum.

Og so er hetta sjálvandi eisini kvøldið, har gyltu skógvarnir skulu handast til tey, sum hava skotið flestu málini í ár. Ein handan, sum tó ikki hevur kravt nakra atkvøðugreiðslu annað enn tað, sum spælararnir hava víst gjøgnum árið.

## Besta spælið

Umframt hesar virðislønir verður eisini latin serlig virðisløn til tað liðið, sum hevur sýnt besta fótbóltsspælið í Formula-deildini í ár. Tann atkvøðugreiðslan er farin fram gjøgnum alt árið, tá ítróttarskrivarar hjá Sosialinum eftir hvønn dyst hava givið liðunum millum ein og seks bóltar fyri avrik sítt.

Virðislønin fyri hetta er, at vinnandi liðið kann geva eitt herðaklapp til eitt av yngru liðum felagsins. Tað stendur spælarunum frítt at velja millum hesi, men spælararnir á tí ungdómsliðnum, sum verður valt, fáa ein spildurnýggja Pumabólt í part, og eru hesir bóltar ogn hjá spælarunum sjálvum – og altso ikki felagnum.

## Virðislønirnar

**Hesar virðislønir verða handaðar í Miðlahúsinum fríggjakvøldið. (Stuðlarnir til einstøku virðislønirnar eru nevndir í klombrum)**

| | |
|---|---|
| **Gylti skógvurin** | |
| Kvinnur | (Thomas Dam Ítróttur) |
| Menn | (Thomas Dam Ítróttur) |
| **Ársins dómari** | (Josie's Juice Bar) |
| **Besta fótbóltsspælið** | (Thomas Dam Ítróttur) |
| **Ársins málverji** | |
| Kvinnur | Burger King) |
| Menn | (Trygd) |
| **Ársins venjari** | |
| Kvinnur | (Hvonn) |
| Menn | (Føroya Bjór) |
| **Ársins stjørnuskot** | |
| Kvinnur | (Prentmiðstøðin) |
| Menn | (Formula.fo) |
| **Ársins spælari** | |
| Kvinnur | (Føroya Tele) |
| Menn | (Føroya Tele) |